DAGSINS MEINING

At fara eftir manninum, heldur enn bóltinum

Tað er ikki lukkuligt at síggja, hvussu harðar reaktiónirnar hava verið, eftir at formaðurin í búskaparráðnum hevur verið frammi við sínum sjónarmiðum um fiskidagaskipanina.

Vikuligi litfaldarin hjá Fólkaflokkinum var sum vant frammi við lítið uppbyggandi viðmerkingum til persónin og uppaftur minni mennandi viðmerkingum til búskaparfrøðingar í breiðastu merking, heldur enn málið. Við øðrum orðum fóru teir eftir manninum, heldur enn bóltinum, nú onkur dittar sær at tosa um fría atgongd og kapping um fólksins ogn.

Tá nú Dagblaðið og einstaklingar eru farnir at leika so í, so kundi verið okkurt, ið bendir á, at uppskotið kanska ikki er so heilt av vegnum kortini. Hvat er galið við, at man skal keypa nakað, ið man hevur loyvi at selja. Tað mátti verið góður politikkur, at hesi bæði fylgdust at. Í hvussu so er, so átti man at kunnað diskuterað hetta, uttan, at fólk verða spilt út, ella at ein heilur fakbólkur verður lagdur undir alt møguligt ilt.

Hví skal man yvirhøvur sleppa at selja nakað, ið ein hevur fingið fyri einki – kann tað verða rætt? Tað eru tey flestu ivaleyst á einum máli um, at tað er tað ikki. Kanska burdi sølurætturin av ikki brúktum fiskidøgum einans ligið hjá landinum.

Fólkaflokkurin hevur eitt sera avslappað forhold til marknaðarbúskap. Tað tykist sum um, at teir bert trúgva helvtina av líkningini. Teir vilja sleppa at selja og fáa inntøku, men keypa, tað vilja teir ikki. Tá so onkur roynir at draga teir út úr varda verkstaðnum, so rópa teir upp um kommunismu og um hvussu óneyðugir búskaparfrøðingar eru fyri landið. Vit ditta okkum at meina, at kjakstøðið kundi verið eitt lítið sindur hægri.

Tað kann verða, at tað, ið formaðurin í búskaparráðnum leggir upp til, ikki er tað rætta, men í hvussu so er, so eru fólk flest á einum máli um, at tað, ið man kann selja fyri vinning, ikki skal forerast til einstaklingar frá landinum. Tað skaðar so einki við einum kjaki um hetta og er tað okkara vón, at eitt konstruktivt kjak kann fáast í lag. Ein meining um eitt mál eigur at verða virðismett, hóast man ikki er samdur. Er uppskotið hjá formanninum í Búskaparráðnum so burtur úr vón og viti, sum m.a. Bjarti Mohr og Dagblaðið halda, so burdi verið lag á manni at argumentera sakliga ímóti. Tað hava vit so ikki sæð enn! Tað kann vera gott við greiðum og kontantum meiningum, men best er við konstruktivum og mennandi orðaskifti, og tað kann ikki júst sigast um ávísar fólkafloksmenn í hesum døgum.

Sosialurin

VIÐMERKINGAR

Ísland 1262 og Føroyar 2002?

Zakarias Wang

Lítið vita vit um hvussu Føroyar vórðu innlimaðar í Noreg, men vit vita hvørjar avleiðingar tað fekk fyri okkum at hetta var gjørt.

Hin vegin vita vit nógv um, hvussu íslendska innlimingin fór fram í árunum 1262 til 1264. Tað norski kongurin kravdi, var, at íslendingar skuldu gjalda honum ein litlan skatt sum ímynd av, at teir høvdu lagt seg undir yvirvald hansara. Tá tað fyrst var gjørt, fingu teir skjótt at kenna, at einki mark var fyri tí, ið norska statsvaldið kundi bjóða teimum, men tá var ov seint at angra, tí nú høvdu norsku stjórnarmyndugleikarnir rætt til at nýta vald ímóti teimum íslendingum, sum ikki vóru teimum ráðandi til vildar.

Noregs og nú okkara viðurskifti við Danmark eru øðrvísi. Vit hava ikki gjørt nakran sáttmála við Danmark um at tað stendur yvir okkum, eigur okkum ella ræður yvir okkum. Tann sáttmáli vit hava, sigur hin vegin, at vit eru á jøvnum føti við Danmark. Vit hava felags kong við Danmark og hava felags uttanríkispolitikk, men vit hava eins nógv ræði á uttanríkisspolitikkinum sum Danmark.

Orsøkin til, at vit í tí dagliga ikki leggja so nógv merki til hetta, er tann, at vit fyri fleiri hundrað árum síðani hava góðkent reglurnar fyri hvør ið skal gerast kongur í Danmark, og at hesin kongur hevur alt lóggávuvald, gerðarvald og dómsvald. Kongur okkara hevur síðan biðið ráðharrar, sum eru útnevndir av dønum, at útinna hetta vald.

Hetta kann broytast um so er, at vit fáa sjálvstýri.

Hetta hava vit fullan rætt til. Tað vit skulu gera, er at velja ein tjóðfund, sum í sjálvum sær hevur alt tað vald, sum í løtuni er hjá donsku ráðharrunum. Tá hava okkara sjálvstýrismyndugleikar javnrættindi við donsku stjórnina í uttanríkispolitikkinum.

Vil danska stjórnin broyta hetta, so má hon koma til okkum og pent biðja um okkara loyvi til at Danmark fer burtur úr ríkjafelagsskapinum og harvið gerst eitt fullvalda ríki.

Hetta hava teir ikki nakað krav uppá, men kunnu vit semjast um treytirnar, so kunnu vit sjálvsagt umhugsa spurningin við vælvild.

Hvat kann gera at hetta ikki fæst í lag?

Eitt sum kann henda er tað, at vit gera ein nýggjan sáttmála við Danmark, sum avtekur tann galdandi sáttmálan okkara millum. Um so er, at vit t. d. í einum slíkum nýggjum sáttmála ganga við til, at Danmark hevur avgerðarrættin í uttanríkispolitikkinum, so eru vit gingin frá tí áseting í okkara núverandi sáttmála, um sigur, at vit eru javningar. Tá er einki mark fyri, hvussu vit kunnu verða tiltuskaðir. Tá hava vit í 2002 gjørt tað sama, sum íslendingar gjørdu í 1262.

Fara vit tá at gremja okkum, kunnu danir við øllum rætti siga: Tit vistu jú hvat ið tit gjørdu, og tá ið tit hava sagt A, so siga vit B!

Dreymir, konufólk og dagliga lívið!

Hans Birgir Hansen

Eg droymi um konufólk um næturnar. Hetta er ein partur av mínum lívi. Eg upplivi tær um dagin, kvøldi og á náttartíð í býnum, í dansi og í veitslum.

Eg havi upplivað nógvar dreingir og menn, fullkomuliga ørar í høvdinum - býttir/svakir. Teir skilja ikki, at eingin av teimum eigur nakra gentu/kvinnu.

Øll hava sítt grundlógartryggjaða frælsi, rættindi, privatlív, og at kunna liva og virka á egnan hátt, uttan óviðkomandi uppíegging.

Eg havi ikki áhuga í slíkum óviðkomandi uppíleggjanum frá børnum, ungdómum og vaksnum fólki. Tey skula passa seg sjálvi, allastaðni í Havnini.

Eg vil siga, at eingin hevur loyvi at elva til bardaga, rópa, geyla, sýna harðskap og aðra ørkymlandi atferð ímóti einum. Hetta er brot á alment reglulag.

Eg havi krav uppá, at fólk gevast við at diskriminera, forfylgja, forfjóna, hótta, kúga, mannajakstra, skuldseta og æðrumeiða ein í Havnini.

Eg haldi at avvarandi foreldur skulu fáa síni børn/ungdómar, at uppføra seg væl allastaðni í býnum, og gevast við tí omanfyri nevnda.

Eg havi nógv at avklára, bæði heima og úti, í øllum lívsins viðurskiftum. Tí skrivar ein lesarabrøv og tekur lut í nógvum kjakfundum.

Eg havi ikki fingið frið at liva og virka eftir náttúrliga uppruna, og ikki fingið nógv skjótt skipa míni lívsviðurskifti her í Havnini.

Eg havi hjálpt nógv uppá búskapar- og samfelagsstøðuna í síni heild við at skriva lesarabrøv og við luttøku á kjakfundum.

Eg føli ikki, at ein skildar nøkrum bygdar/býar/havnarfólki nakað, ið ikki uppføra seg ordiliga.

Viðmerking til lesarabrøv hjá Heina Olsen

Herfyri prentaðu vit lesarabrøv hjá Heina Olsen, sum m. a. snúði seg um Helenu Dam á Neystabø. Vit skulu fyri ein ordans skuld siga frá, at tað ikki er Heini Olsen, verkfrøðingur, í Havn, sum hevur skrivað brøvið. Men ein annar Heini Olsen.

blastj.

Sosialurin
Stovnaður: 1927
Ábyrgdarblaðstjóri:
Jan Müller jan@sosialurin.fo
Blaðstjóri:
Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
Tiðindaleiðari:
Justinus Eidesgaard justinus@sosialurin.fo
Marknaðardeild: lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Anja Weihe anja@sosialurin.fo
Blaðfólk:
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Turið Kjølbro turid@sosialurin.fo
Stefan í Skorini stefan@sosialurin.fo
Heri á Rógvi heri@sosialurin.fo

Ítróttur:
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Myndamenn:
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Sosialurin í Norðoyggjum:
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1
700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
Uppseting/prent:
Uppseting: Hestprent
Prent: Prentmiðstøðin
Útgevari:
Sp/f Sosialurin

Avgreiðsla:
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 311820, Fax 314720
Postadressa:
Postboks 76, 110 Tórshavn
E-mail:
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað
mánadag-friggjadag klokkan 14[00]

Lýsingar

Freistir:	Tekstlýsingar	Størri lýsingar	Lýsingartorgið	Heilsanir
Týsdagsblaðið	Mán.kl. 10	Frí. kl. 15	Frí. kl. 12	Frí. kl. 12
Mikudagsblaðið	Týs. kl. 10	Mán. kl. 15	Mán. kl. 12	Mán. kl. 12
Hósdagsblaðið	Mik. kl. 10	Týs. kl. 15	Týs. kl. 12	Týs. kl. 12
Friggjadagsblaðið	Hós. kl. 10	Mik. kl. 15	Mik. kl. 12	Mik. kl. 12
Leygardagsblaðið	Frí. kl. 10	Hós. kl. 15	Hós. kl. 12	Hós. kl. 12

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

Stødd:
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

Innsent tilfar
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.

VIÐMERKINGAR

Eitt frælst vinnulív

Rói Egholm

Vit hava eitt rímiliga frælst vinnulív, tá ið tað snýr seg um tænastuvinnuna í Føroyum, t.v.s. innan handverk, handil o.tíl.

Her kunnu øll við dirvi, ágrýtni og ambitiónum byrja sína egnu fyritøku og sostatt skapa nýggj arbeiðspláss.

Tey, sum fáa tað at bera til, kunnu liva væl av hesum, meðan hjá teimum, sum tað ikki melur runt, ja tey mugu steðga aftur og finna sær annað at gera.

Hendan gongdin sýnist at virka væl og flest øll halda, at soleiðis eigur tað at vera.

Men so skjótt vit nærkast høvuðsvinnuni ella onkrum, sum hevur við ræðisrættindi at gera, so renna vit pannuna ímóti stongdum durum og er tað næstan ómøguligt at koma innum.

Her broytast spælireglurnar munandi. Hetta seta fólk heldur ikki spurnartekin við. Hví gera tey ikki tað?

Flest øll innan fiskivinnuna eru samd um, at uppboðssølan av ráfiski hevur optimerað vinnuna á landi munandi og vinnan er nú før fyri at gjalda meira fyri fiskin enn áður.

Uppboðssølan skapar eisini umstøður fyri, at øll, sum vilja, kunnu koma at fiskinum og byrja egna fyritøku og harvið skapa nýggj arbeiðspláss, antin við framleiðslu ella við keyp og sølu av heilum fiski av landinum.

Fiskivinnan á landi er vorðin meira dynamisk og ein ávís menning er í vinnuni á landi. Vit eru enntá komin har til, at um eitt virki ikki klárar seg, so sleppur tað at fara á húsagang. Hetta orðið "húsagangur", sum fyrr var tabu, er nú brádliga vorðið natúrligt.

Í byrjanini við uppboðssøluskipanini fór nógvur fiskur heilur av landinum, tí føroysku virkini kláraðu ikki kappingina í prísinum.

Hendan kappingin noyddi føroysku fiskasølurnar og virkini at betra sín førleika og eru tey nú væl betur við í kappingini.

Tann heili fiskurin av landinum er minkaður munandi og føroyska vinnan á landi hevði, í 2001, tað besta búskaparliga árið síðani fyri kreppuna.

Hetta sýnist at vera ein gongd leið fyri vinnuna á landi, men hvat er tað, sum forðar okkum í at føra hesa skipanina út í fiskivinnuna á sjógvi ella t.d. landbrúkið?

Eg skilji væl, at tey, sum hava fingið ognað sær rættin at gagnnýta okkara tilfeingi, ikki vilja hava kapping á økinum. Óttin fyri at tapa kappingina lúrir.

Fiskivinnan á sjógvi er vard ímóti kapping. Slík verja førir við sær, at vinnumennist seinni og gevur sjáldan besta avkastið, hvørki til eigarar, arbeiðsfólk ella til samfelagið.

Fólkaræði í vinnuna

Ofta verður sagt, at fiskiloyvini eru politiskt býtt út, t.v.s. at einstakur flokkur situr á partrolara- og rækjuflotanum, meðan aðrir flokkar sita á djúpvatnsflotanum o.s.fr.

Tað er av týdningi at skapa eina skipan har tílíkt ikki er møguligt. Eina skipan sum byggir á ta fólkaræðisligu hugsjónina. Hví ikki føra uppboðssølu skipanina heilt út til ytsta liðið í vinnuni og seta fiskidagarnar á uppboðssølu?

Allir føroyingar skulu, eftir tørvi, kunna keypa fiskidagar galdandi fyri eitt ávíst tíðarskeið. Tá tíðarskeiðið er at enda komið, gongur loyvið út og verður síðani boðið út av nýggjum.

Í einari slíkari skipan hevur atkoman at ræðisrættindunum einki við politiskar flokkar at gera, men er ein rein búskaparlig avgerð.

Somuleiðis sleppa vit undan afturvendandi kjakinum um innflutningsloyvi til skip. Einum og hvørjum hevði staðið frítt at innflutt skip, um tey bert lúka føroyska krøv og koma undir føroyska merkið, tí tað verða loyvini og ikki skipini, sum avgera, hvør og hvat verður fiskað.

Soleiðis høvdu bert tey best riknu skipini við teirri bestu hagreiðingini yvirlivað og sostatt havt ein sunnan búskap. Tann parturin av flotanum, sum ikki klárar seg, fellur burtur og nýggjar kreftir kunnu koma til. Hetta er meginreglan í einum liberalum vinnulívi.

Útlendskar handilsfyriøkur siga, at føroyingar ikki kunnu fáa fatur í teimum sáttmálunum, sum gjalda hægsta prísin fyri fiskaúrdráttir, tí vit ikki kunnu tryggja okkum rávøruna frá føroysku skipunum.

Men við einum útflutningssáttmála við høgum prísum í hondini ber til at gjalda meira fyri fiskidagarnar á eini uppboðssølu og harvið vinna kappingina.

Sannlíkt er, at tey, sum sita við loyvum í dag, helst seta seg hart ímóti eini slíkari skipan. Ivin fyri úrslitinum av møguligari kapping sáar jú ótta.

Tað kann væl vera, at nýggir aktørar koma inn í fiskivinnuna á sjógvi, men ræðisrættindini koma á hendan hátt altíð at vera landsins ogn, meðan møguleikarnir bløma í vinnuni júst so sum flest allir føroyingar ynskja.

Politikarar eiga at skapa karmar fyri allar føroyingar, sum er til frama fyri alla tjóðina. Ein tryggur vegur at røkka hesum er at gera lógirnar eins fyri øll.

Hetta eru mál, sum skulu røkkast áðrenn loysingina.

Eingin samgonga einsamøll, men Føroya fólk fremur loysing. Og Føroya fólk fremur onga loysing fyrr enn tey á egnum kroppi merkja, at lógin er eins fyri øll.

Ríkisfelagsskapurin og tónleikur: Estland vísir Føroyum vegin

Viðmerkingin til lesarabrævið hjá Jákupi Fróða Djurhuus í Sosialinum frá 15.februar: "Føroyingar kunnu alt møguligt innanfyri Ríkisfelagsskapin — eisini vinna Grand-Prix"

Ivan Eginsson

Eftir at hava lisið viðmerkingina hjá Jákupi Fróða Djurhuus um luttøkuna hjá Pæturi við Keldu í donsku Grand-Prix kappingini herfyri, verður ein ikki sørt ørkymlaður. Valevnið á Sambandslistanum í Suðurstreymi rør uppundir, at tað ber meir enn so til hjá føroyingi at vera við til eina stora danska tónleikarakapping, har vinnarin skal umboða Danska kongaríkið á evropeiska pallinum.

Tað er eyðsæð, at Jákup Fróði fullkomiliga mótsigur sær sjálvum. Hann slær fast, at luttøkan í kappingini og áhugin fyri henni í Føroyum ber boð um, at føroyingar eru ein serstøk tjóð. Men samstundis mælir hann Pæturi til at siga tað vakra føroyska navnið frá sær, fyri at hava møguleika at gerast vinnari í einari, so at siga, innanhýsis danskari kapping. Í hesum liggur sjálvsagt tað, at føroyska navnið skurrar í oyrunum hjá donum.

Rætt skal Jákup Fróði hava, ein tónleikari við navni, púra fremmandum í Danmørk (Pætur við Keldu, Arantes Edson do Nacimento, ella — hví ikki — Abdullah Osama bin Laden), hevði havt tað ógvúliga trupult við at vunnið eina danska kapping, tí at ein vanligur dani altíð tekur ein dana framum ein føroying, ein týskara, ein brasiliana, ein irana, osv. Og tað er púra normalt eisini. Sambært logikkinum hja Jákupi Fróða sjálvum, so eigur ein luttakari úr Føroyum at vera "Danskeren hjemmehørende paa Færøerne" (Peder Kilde kanska?), við einum lagi, passaligum til hvørki føroyska ella evropeiska, men heldur danska fatan, fyri at hava nakran kjans yvirhøvur. Onkur serfrøðingur hjá Politiken helt lagið hjá Pæturi vera best av øllum, men ikki ordiliga danskt. Og tað var tað einasta, ið feilti hasum lagnum. Tí vann Pætur ikki. Harfyri er ikki sagt, at lagið ikki kundi vunnið evropeisku kappingina júst í tí hami og ferð, sum Pætur hevði smíðað tað, hugsið bert um Johnny Logan á sinni. Hetta er bara eitt dømi um, at føroyingar hava lítið og einki at siga í einum so kallaðum "javnbjóðis ríkisfelagsskapi". Og tað staðfestir bert einaferð afturat, hvussu langt danir og føroyingar standa hvør fra øðrum, tá ið tað kemur ikki bara til tað málsliga, men eisini tónlistarliga, og mentanarliga sum heild.

Men tað finst eisini ein annar vegur. Fyri fimtan árum síðani var Estland bara ein lítil, ósjónligur og einki sigandi partur í sovjetiska ríkinum, politiskt og sjálvandi eisini tónlistarliga. Í dag eru estlendingar á jøvnum føti við hinar sjálvstøðugu evropeisku tjóðirnar. Fyri nøkrum árum síðani, eftir at hava loyst frá risastóra granna sínum, fekk Estland eisini rætt til at vera uppi í evropeiskum Grand-Prix kappingum — eitt land skal sjálvandi hava fult politiskt frælsi, fyri at luttaka. Í fjør gjørdist Estland vinnari í kappingini. Størri áhuga uttanifrá kundi eitt lítið land ikki droymt um. Kappingin í ár verður nú hildin í estiska høvudstaðnum, Tallinn. Annars hava hvørki Sovjetsamveldi ella Russland nakrantíð vunnið hesa kappingina.

Men ímynda vit okkum tað óhugsandi, at Pætur við Keldu, ella Eivør Pálsdottir, ella onkur annar føroyingur, fyrst vinnur eina danska Grand-Prix kapping, og síðan eina evropeiska — hvat verður so? So verður Danmørk, og als ikki Føroyar, kunngjørt sum vinnari. Tað hevði verið øgiliga keðiligt og hugstoytt, hjá undirritaða í hvussu er, at sæð danska flaggið, og ikki føroyska Merkið, á skiggjanum, tá ið stigini verða givin, men sambandsmaðurin Jákup Fróði Djurhuus er - eftir øllum at døma - ósamdur við mær her. Og hevði ein Evropeisk Grand-Prix kapping verið hildin í Norðurlandahúsinum í Havn árið eftir? — nei, hon hevði sjálvandi verið í Keypmannahavn — í danska, og ikki føroyska høvuðstaðnum. Tað er Danmørk, og bara Danmørk, ið verður heiðrað fyri eitt føroyskt avrik.

Hví kunnu føroyingar ikki vera føroyingar og fara, eins og estlendingar, uppí hesa evropeisku Grand-Prix kappingina sjálvir, uttan um Danmørk? Sum aðrar pinkutjóðir, Ísland og Malta? Føroyar kundu verið við í kappingini á næstan hvørjum ári, tað vita vit, sum kenna okkurt til føroyskar tónleikar og støði teirra. Sum støðan er í dag, ber tað als ikki til at droyma um nakra sjálvstøðuga luttøku — á Evropa kortinum finst jú eingin suverenur statur, sum eitur Føroyar

Undirritaði vil heilsa Jákupi Fróða Djurhuus — ja, føroyingar kunnu sannliga alt møguligt. Ikki innan ríkisfelagsskapin, har teir eru fyri vanbýti ferð eftir ferð (júst hetta við Pæturi við Keldu er eitt sera gott dømi), men sum ein sjálvstøðug tjóð í heimshøpi. Sum í fótbólti - ikki nakað Færøernes BK i donsku 2. ella 3.deild, men FØROYAR í altjóða HM- og EM- kappingum.

Danemark — 1 point
Les Iles Feroe — 12 points_!